## Sjúkrahús verða samskipað

**Bíðilistarnir skulu minkast, færri skulu viðgerðast uttanlands, og virksemið á teimum trimum sjúkrahúsunum skal samskipast betur. Tað hevur Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum, sett sær fyri**

HEILSA
*Ingi Rasmussen*

Stóra menningin í tøkniger, at alsamt fleiri viðgerðartilboð eru til fólk. Tað viðførir samstundis, at Føroyum tørvar fleiri læknar og heilsustarvsfólk.

Bill Justinussen hevur sett ein arbeiðsbólk við tí endamáli at fáa samskipað virksemið á teimum trimum sjúkrahúsunum, soleiðis at vit framhaldandi kunnu fáa nøktandi heilsutænastur á so nógvum økjum sum møguligt.

Ætlanin er, hetta arbeiðið skal enda við, at latið verður landsstýrismanninum eitt álit einaferð í heyst, sum hevur uppskot til, hvussu heilsuverkið kann endurskipast.

Arbeitt verður eisini við at minka bíðilistarnar, serliga til tær løttu skurðviðgerðirnar. Í tí sambandi er framvegis ætlanin at føra neyv hagtøl yvir bíðilistar til tær ymisku viðgerðirnar. Upplýsingarnar skulu vera almenn fyri øll.

Landsstýrismaðurin hevur eisini sett sær fyri at minka um útreiðslurnar til viðgerð uttanlands. Í 2002 vóru 1480 sjúklingar sendir uttanlands til viðgerðar. Nú verður kannað, um tey trý sjúkrahúsini kunnu gera nakrar av hesum viðgerðum í Føroyum.

Samstundis er farið undir eitt miðvíst arbeiði at fáa greiði á, um tann tænasta, sum sjúkrahúsini keypa, og tann viðgerð, sum verður veitt á útlendskum sjúkrahúsum, kann verða skipað øðrvísi, so tað gagnar sjúklinginum best.

# Læknatrotið vindur upp á seg



*Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum, hevur eina trupla og umfatandi uppgávu, tí trot er á bæði kommunu- og sjúkrahúslæknum*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Trotið er stórt á læknum, ásannar landsstýrismaðurin við heilsumálum. Hann hevur tí játtað, at tveir kommunulæknar vera settir afturat í høvuðsstaðarøkinum, um játtan fæst á fíggjarlógini. Harafturat skal ein loysn finnast á læknaloysinum í Sandoynni. Samstundis verður miðvíst farið undir at fyribyrgja sjúkum frá ungum árum**

HEILSA
*Ingi Rasmussen*

Trot er á kommunulæknum í Føroyum, og fleiri av teimum, sum eru í starvi, nærkast pensjónsaldrinum.

Hetta er ein av álvarsligu trupulleikunum, sum føroyska heilsuverkið fær at dragast við næstu árini. Í ólavsøkurøðuni nam løgmaður við spurningin, og í fylgiskjølunum sæst, hvørjar loysnir, Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum, arbeiðir við.

Í løtuni eru fimm av 30 kommunulæknastørvum ósett, hóast javnan verður lýst eftir læknum at manna størvini. Trupulleikin er á ongan hátt serføroyskur, tí læknatørvur er í øllum Norðurlondum, og soleiðis hevur verið leingi, men í Føroyum eru færri læknar fyri hvønn íbúgva enn aðrastaðni.

Í 2002 vórðu stig tikin til at loysa kommunulæknatørvin við at skipa fyri at útbúgva kommunulæknar í Føroyum. Í besta føri merkir hetta, at tørvurin og trotið ikki verður størri, nú nógvir av teimum gomlu kommunulæknunum fara frá.

### Tveir afturat í Havn

Serliga í høvuðsstaðarøkinum hevur trýstið verið stórt á kommunulæknarnar, tí fólkavøksturin hevur verið so stórur. Bill Justinussen hevur tí gjørt av at játta einari umsókn frá Tórshavnar kommunu um at skipa tvey kommunulæknastørv afturat í Tórshavn við teirri treyt, at neyðug játtan fæst á komandi fíggjarlóg.

Vera størvini lýst leys, er neyvan trupult at manna tey, tí tað vísir seg, at læknar helst vilja arbeiða í høvuðsstaðnum. Hinvegin hava læknaviðurskiftini í Sandoynni í áravís ligið í skeljasori. Í løtuni er eingin fastur kommunulækni í Sandoy.

Í frágreiðingini hjá løgmanni á ólavsøku stendur at lesa, at arbeitt verður í løtuni saman við kommunum í hesum læknadømi til tess at fáa eina varandi loysn, sum sandoyingar og skúvingar kunnu vera nøgdir við.

### Ein vaktarmiðstøð

Avgjørt er at raðfesta soleiðis á kommunulæknaøkinum, at orka fyrst verður løgd í at bøta um arbeiðsviðurskiftini hjá kommunulæknunum. Fyrsta stigið er at lætta um tær mongu vaktirnar við at gera eina nýggja vaktarskipan fyri meginøkið og Sandoynna, ið verður løgd á eina læknamiðstøð í nýggja bygninginum á Landssjúkrahúsinum.

Nýggja vaktarskipanin skal veita teimum, ið tørva læknahjálp fyri og eftir vanliga arbeiðstíð, betri tænastu og kommunulæknunum betri arbeiðsumstøður.

Miðað verður eftir, at vaktarskipanin verður sett í verk, tá nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu.

### Bert ein skúlalækni

Ein annað læknamál, sum hevur ligið óloyst í áravís, er skipanin við skúlalækna. Tað er ein stórur trupulleiki, at skúlalækni ikki er á nógvum av landsins skúlum, ásannar landsstýrismaðurin.

Nú er eitt uppskot til nýggja skúlalæknalóg loksins sent til ummælis, og áhugin vísir seg at vera stórur fyri skúlalæknaskipanini, tí nógvar viðmerkingar eru innkomnar.

Sambært uppskotinum, ið sent var til ummælis, skal bara vera ein skúlalækni í Føroyum. Skúlaláeknin skal so koma runt í allar skúlar, og tað skal gera, at skúlalæknin fær serkunnleika á økinum. Í hesum sambandi skal skúlalæknin millum annað samstarva við heilsuverkið og fakbólkar, so sum heilsusystrar lærara og onnur.

Uppskotið skal virka fyri, at fyribyrgjandi arbeiðið verður betri á skúlunum við heilsukanningum, ráðgeving og verkætlanum.

### Fyribyrging fyrst

Fólkaheilsa og heilsufremjandi tiltøk verða raðfest ógvuliga ovarlaga, stendur í frágreiðingini hjá løgmanni. Yvirhøvur er fyribyrging eitt mál, sum Bill Justinussen hevur sett í hásæti.

Ætlanin er, at tiltøkini hava fasta stevnu, so tey í fyrstu atløgu venda sær til og fata um børn og ung. Økini, sum verða raðfest, eru kostur, rørsla, rúsevni og harðskapur. Í hesum sambandi varð skipað fyri evnisdegi, sum hevði til endamáls at geva íblástur til fyribyrgingararbeiðið.

Ein arbeiðsbólkur er settur undir Fyribyrgingarráðnum. Uppgáva teirra verður at arbeiða við heilsufremjandi tiltøkum til frama fyri fólkaheilsuna. Somuleiðis er peningur settur av á fíggjarlógini í ár til at gera trivnaðarkanningar.



Borgarstjórin í Klaksvík um Norðoyatunnilin:

# Alt ov ógreitt

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, er ónøgdur viðvíkjandi gongdini í málinum um ognan av lendi til vegagerð klaksvíksmegin tunnilin. - Vit hava einki fingið at vita frá hvørki Landsverkfrøðinginum ella Vinnumálastýrinum, og slíkt skapar ótryggleika og óvissu fyri Klaksvíkar Kommunu**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Í Klaksvíkar Kommunu hevur rættiligur ivi tikið seg upp um lendi í Klaksvík, har vegagerð í næstum er á skránni. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, vísir á, at teir í longri tíð hava væntað at fingið boð ella upplýsingar frá antin Landsverkfrøðinginum ella Vinnumálastýrinum, men enn er einki hent í málinum

### Alt er ógreitt

Steinbjørn Jacobsen vísir á, at lendi, har vegir skulu gerast, er privat ognarjørð, og talan er um umleið 120 persónar, sum eiga partar í lendinum. Enn hevur eingin fingið bræv, ongar samráðingar eru farnar í gongd, og Klaksvíkar Kommuna veit ikki, hví teir enn ikki hava fingið nakra ábending um, hvat fer fram.

– Vit mugu tíverri siga, at vit eru rættiliga misnøgdir við higartil einki at hava frætt. Í løtuni er alt viðvíkjandi vegagerð ógreitt, og tískil kunnu vit ikki fyrireika okkum til tað megnararbeiði, kommunan hevur ábyrgd av og sum liggur fyri framman, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Borgarstjórin vísir víðari á, at í flestu førum er talan um eina langa prosess, tá samráðingar og semjur skulu finnast um ognarjørð, og gerst talan um ognartøku, kann málið veruliga gerast langdrigið.

Vegur skal gerast frá tunnilsmunnanum klaksvíksmegin og til landsvegin, og rundkoyring skal vera við Tekniska Skúla. Vegastrekkið er umleið 400 metrar, og tískil er talan um eitt stórarbeiði, sum í løtuni skuldi verið greiðari fyri Klaksvíkar Kommunu.

Steinbjørn Jacobsen ynskir ítøkiligar upplýsingar, og hann metir, at málið hevur verið alt ov stilt seinastu tíðina.

– Eg undrist á, at viðurskiftini ikki eru greiðari. Vit hava havt gott samskifti og samarbeiði við P/F Norðoyatunnilin, men hetta málið viðvíkjandi vegagerð hevur Landsverkfrøðingurin undir Vinnumálastýrinum ábyrgdina av, og vit vita ikki, nær og hvat fer fram, sigur borgarstjórin.

Hann undrast eisini á, at bert Heini O. Heinesen hevur verið frammi og víst á ov ógreið viðurskifti í sambandi við verkætlanina.



*Steinbjørn Jacobsen er ikki nøgdur við verandi viðurskifti í tunnilsverkætlanini um Leirvíksfjørð. – Viðurskiftini eru alt ov ógreið, og vit fáa ov lítið at vita*

Steinbjørn sigur, at uttan uppýsingar fara gitingar í gongd, og søgur um, at eingin peningur fyriliggur til verkætlanina, eru eisini farnar í gongd, tó uttan nakra staðfesting.

### Borgarin hildin fyri gjøldur

Steinbjørn vísir á, at teir ikki hava áhuga at blanda seg í politisku viðurskiftini, tí tað eru landspolitikarar til, men kommunalu myndugleikarnir eiga at hava ítøkiligari upplýsingar at arbeiða við.

Talan er um alt ov lítla upplýsing til bæði kommununa og fólkið. Við ov lítlari vitan skapast leysasøgur og ógrundaðir pástandir, og spurdur um hetta er borgarstjórin avgjørdur.

– Í Klaksvík veit eingin, hvat fer fram, og við ein verkætlan á 3-400 mió. krónur hevur borgarin rætt til støðugar upplýsingar frá teimum, sum hava ábyrgdina. Borgarin verður í løtuni hildin fyri gjøldur í løtuni, staðfestir Steinbjørn Jacobsen at enda.

Landsverkfrøðingurin:

# Eingin peningur fyriliggur enn

**Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur, vísir í viðmerking til Steinbjørn Jacobsen á, at eingin peningur fyriliggur enn til lendið í Klaksvík, har landsvegur og rundkoyring skal gerast. – Vit bíða framvegis eftir eykajáttanini á 4-500.000 krónur**



*Oyvind Brimnes, Landsverkfrøðingur, bíðar eftir eykajáttan, sum Vinnumálastýrið hevur søkt um. - Nú bíða vit bert eftir eykajáttanini, tí áðrenn peningur fyriliggur kunnu vit ikki fara í holt við ognartøku*

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Landsverkfrøðingurin Oyvindur Brimnes staðfestir tað, Steinbjørn Jacobsen spyr um viðvíkandi peningi hjá Landsverkfrøðinginum, at eingin peningur enn fyriliggur hjá teimum at fara í holt við keyp ella ognartøku av lendi í Klaksvík, har landsvegur skal gerast. Men neyðugu upphæddirnar skuldu sambært Oyvind Brimnes verið játtaðar í nærmastu framtíð.

– Vit hava søkt um eykajáttan á 4-500.000 krónur gjøgnum Vinnumálastýrið, og vit vóna sjálvsagt, at peningurin verður játtaður, tí uttan hann kunnu vit ikki fara í gongd við ognartøku.

### Brøvini farin út

Tá talan er um so nógvar privatpersónar, sum eiga jørð, verða brøv send til allar eigarar í staðin fyri vanligar samráðingar, tí tað hevði tikið ov langa tíð. Ein partur av brøvunum verður sendur frá Landsverkfrøðinginum, meðan hin parturin verður sendur frá P/F Norðoytunnilin. Landsverkfrøðingurin váttar, at brøvini til tað jørðina, teir skulu ogna sær, eru send til eigarar beint undan ólavsøku. Sostatt eru brøvini farin út, og freistin er fýra vikur.

Landsverkfrøðingurin vísir á, at teir hava gjørt tað, teir skulu, og í løtuni verður sostatt enn bíða eftir peninginum, sum enn ikki er játtaður, og sum sambært borgarstjóranum Steinbjørn Jacobsen hevur skapt óvissu í Klaksvík.

Viðmerkjast skal, at undirritaði royndi til fánýtis at fáa eina viðmerking frá Karsten Hansen áðrenn evstamark á blaðnum, men vónandi hava vit eina viðmerking frá honum um eykajáttanina til næstu útgávu.